
Id	% færdigt	Opga	Opgavenavn
1	**100%**		**Program forberedelse**
11	**100%**		**Programstart – 2021**
14	**100%**		**Programgennemførelse 2021 til 2023**
29	**0%**		**Menningarleið 1**
30	0%		1.1 Borgara-umsiting (Citizens administration)
31	0%		1.2 Inntøkur og ogn (A/B/Ú, finansiel og fysisk ogn)
32	0%		1.3 Innheinting – úttanhýsis
33	0%		1,4 Persónsskattur (Citizens tax)
34	0%		1,5 Persónsskatturbókhald
35	0%		1.6 Kommunubýtið
36	0%		1.7 Eftirløn (Retirement Pension)
37	0%		1.8 Eftirlønaravrokning
38	0%		1.9 Marknaeftirlit (Boarder controle)
39	**13%**		**Menningarleið 2**
40	49%		2.0 Heildarmynd – Virki
41	56%		2.1 Virkisumsiting (Company administration)
42	0%		2.3 Feil stýrisskipan – error handling
43	0%		2.4 Hendingarloggur – Applicationlog
44	0%		2.5 Standard skipan til hendingar
45	0%		2.6 Standard skipan til skjalagoymslu
46	0%		2.7 Virkisskattur (Company tax)
47	0%		2.8 Virkisskatturbókhald
48	0%		2.9 Innflutningur (Import customs)
49	0%		2.10 Flutningur
50	0%		2.11 Famur (Cargo)
51	0%		2.12 Kapitalvinningsskattur
52	0%		2.13 Vinnigsbýti
53	0%		2.14 Avgjøld (Duties)
54	0%		2.15 Útflutningur (Export)
55	0%		2.16 Toll- og vøruskrá (Customs tarriff registry)
56	**6%**		**Menningarleið 3**
57	16%		3.1 Barsilsgrunnurin
58	0%		3.2 Standard kladde system
59	0%		3.3 Standard 360 integration (opret sag og søg sag)
60	0%		3.4 Standard forspørgsels system
61	0%		3.5 Rentistuðil
62	0%		3.6 Frítíðarløn
63	0%		3.7 Brukaraumsiting BG og VG
64	0%		3.7 AM grunnurin
65	**0%**		**Menningarleið 4**
66	0%		4.0 Valg av bókhaldsskipan
67	0%		4.1 Debitorbókhald (Accounting)
68	0%		4.2 Útgjald
69	0%		4.3 Gjaldstovubókhald
70	0%		4.4 Innheinting (Dept collection)
71	**0%**		**Program afvikling**



Heildarætlan - Varðar

#	Verkætlanir	2024	2025	2026	2027	2028	2029	Meting (toymisdagar)	Væntandi liðugur
	Menningarleið 1	**208**	**220**	**215**	**173**	**225**	**50**	**1091**	
1.1	Borgaraumsiting	115						115	2024
1.2	Inntøkur og ogn	52						52	2024
1.3	Innheinting, úttanhýsis	41	100					141	2025
1.4	Persónsskattur		120	168				288	2026
1.5	Persónsskattur, bókhald			47	110			157	2027
1.6	Kommunubýtið				63			63	2027
1.7	Eftirløn					94		94	2028
1.8	Eftirlønaravrokning					31		31	2028
1.9	Markaeftirlit					100	50	150	2029
	Menningarleið 2	**207**	**195**	**212**	**206**	**213**	**179**	**1212**	
2.0	Heildarmynd - Virki	37						37	2024
2.1	Virkisumsiting	60						60	2024
2.2	Feilstýrisskipan, errorhandling	10						10	2024
2.3	Hendingarloggur	20						20	2024
2.4	Standard skipan til hendingar	20						20	2024
2.5	Standard skipan til skjalagoymslu	20						20	2024
2.6	Virkisskattur	40	54					94	2025
2.7	Virkisskattur, bókhald		31					31	2025
2.8	Innflutningur		110					110	2025
2.9	Flutningur			120				120	2026
2.10	Famur			92	23			115	2027
2.11	Kapitalvinningsskattur				58			58	2027
2.12	Vinningsbýti				52			52	2027
2.13	Avgjøld				73			73	2027
2.14	Útflutningur					183		183	2028
2.15	Toll- og vøruskrá					30	179	209	2029
	Menningarleið 3	**40**	**40**	**210**	**130**	**0**	**0**	**420**	
3.1	**Barsilsgrunnurin**	**150**	**150**					390	**2025**
3.2	Standardkladda, skipan	20						20	2024
3.3	Standard integratión til 360	20						20	2024
3.4	Standard fyrispurningarskipan		40					40	2025
3.5	Rentistuðil			167				167	2026
3.6	Frítíðarløn			43	30			73	2027
3.7	Brukaraumsiting BG og VG				100			100	2027
3.8	**AM grunnurin**					**125**		125	**2028**
	Menningarleið 4	**0**	**180**	**128**	**199**	**0**	**0**	**507**	
4.1	Debitorbókhald		180	45				225	2026
4.2	Útgjald			52				52	2026
4.3	Gjaldstovubókhald			31				31	2026
4.4	Innheinting				199			199	2027
	Ialt	**455**	**635**	**765**	**708**	**438**	**229**	**3230**	

#	Projektnavn	Lýsing
	Menningarleið 1	
1.0	Heildarmynd - Borgari	Nútíðargerð av heildarmynd av upplýsingunum sum TAKS hevur um ein borgara. Hetta er fyri at starvsfólk á TAKS lættliga kunnu fáa eina heildarmynd av borgaranum, uttan at borgarin skal upplýsa óneyðug viðurskifti tá tey venda sær til TAKS. Avgreitt í 2023.
1.1	Borgaraumsiting	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av grundupplýsingum um hvønn einstakan borgara. Her er talan um búðstaðar og kontaktupplýsingar, útgjaldskontonummar og TIN nummar. Harumframt umsiting av skattskyldu í ymiskum smanhangaum, so sum kirkjuskatti, frádráttir og undantøkum. Ein partur er eisini at endurskoða datu-samskifti við FOLK.
1.2	Inntøkur og ogn	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av inntøkugrundarlagnum fyri skattatútrokningini hjá borgarum. Í dag verður hetta arbeiðið gjørt við serligari brúkaraatgongd í Borgaraglugganum, tí hetta ikki er gjørligt í gomlu skipanini, og Borgaragluggin er als ikki hóskandi arbeiðsamboð. Projektið skal samla allar upplýsingar um inntøkur á eitt stað.
1.3	Innheinting, úttanhýsis	Sambært norðurlendskum samstørvum, so hevur TAKS samstarv um innkrevjing av krøvum hjá hvør øðrum. Hetta snýr seg eisini um innkrevjing av krøvum hjá Almannaverkinum og øðrum almennum stovnum. Innkevjingingarskyldan frá útlandinum er ein serlig uppgáva í hesum sambandinum at effektivisera.
1.4	Persónsskattur	Skattaútrokningin skal nútíðargerast. Skatturn skal framhaldandi roknast rætt við núverandi logaritmum. Projektið snýr seg eisini um at skipanin verður nútíðargjørd við samtiðar koyringum sum ikki eru bundnar at náttarkoyringum (batchkoyringum), sum gamlar skipanir annars eru. Projektið kemur annars eisini at taka atlit til skynsamst eftirlit, sum gamla skipanin annars als tekur atlit til.
1.5	Persónsskattur, bókhald	Nútíðargera og endurskoða háttin sum gamla skipanin bókar skatt og roknar rentur. Í gomlu skipanini eru bókingarnar í skattabókhaldinum gjørdar á ein serligan hátt sum ger tað trupult hava gjøgnumskygni í krøvunum. Í projektinum verður arbeitt við at broyta grundreglur fyri bókingum, um tað er møguligt. Herundur skal projektið eisini taka atlit til at endurskoða bókingarhátt, soleiðis at fylgt verður ávísum standardi í mun til felags bókhaldsskipan framyvir.

1.6	Kommunubýtið	Kommunubýtið skal nútíðargerast. Kommunubýtið er ein skipan hjá TAKS sum býtur skatt imillum land kommunurur, og hetta er ein skipan sum er blivin meira og meira kompleks við fleiri og fleiri krøvum. Tí má hetta endurskoðast og gerast meira einfalt.
1.7	Eftirløn	Nútíðargera og effektivisera skipanina sum er gjørd til at krevja inn lógarásetta eftirløn. Herundir eisini skattarokningina av eftirlønini og reguleringar í eftirlønarskattinum.
1.8	Eftirlønaravrokning	Nútíðargera avrokningina av eftirløn til eftirlønarveitarar. Avrokningin umfatar peningatransaktiónir til veitarar, og rapportering til veitarer um inngoldnu eftirlønina. Hetta projektið rakar markamótið til eftirlønarveitarar og SDC. Tí er upplagt at tosa við hesar áhugabólkar um at nútíðargera hesi markamót.
1.9	Markaeftirlit	Nútíðargera skipanina og betra møguleikarnir hjá tolleftirlitinum at hava skynsamt eftirlit við frakt sum kemur til Førorya. Projektið kemur tískil eisini at snúgva seg um at kanna møguleikar við profilering og eftirlit ísmb. við innflutning.
	Menningarleið 2	
2.0	Heildarmynd - Virki	Gera eina heildarmynd við øllum upplýsingum sum TAKS hevur um eitt virki. Á henda hátt fáa starvsfólk á TAKS lættliga eitt samlað yvirlit yvir fyrtøkuna sum er týdningarmikið. Hetta projektið er komið væl áleiðis, men er ikki heilt liðugt.
2.1	Virkisumsiting	Gera eina brúkaravinarliga og samanhangandi skipan til umsiting av fyritøkum. Av tí at hetta projektið koyrur paralelt við nýggju Virkisskránni hjá Talgildu Føroyum "Virkið", snýr tað seg eisini um at gera eina hóskandi dataútveksling ímillum Virkið og TAKS. Harafturat er eisini talan um nútíðargerð av umsitingini har TAKS ásetur skyldur so sum skattskylda, mvg-skylda, undantøkur osv.
2.2	Feilstýrisskipan, errorhandling	Gera eina standardiseraða og brúkaravinarliga skipan at fráboða feilir í skipanini. Henda standardskipan verður endunýtt í øllum skipanunum.
2.3	Hendingarloggur	Gera eina standardloysn til at logga allar fyrispurningar og hendingar í skipanini. Henda standarskipan verður endurnýtt í øllum skipanunum.
2.4	Standard skipan til hendingar	Gera ein standardiseraðan máta at skráseta hendingar sum koma uttanifrá og sjálvvirkandi hendingar sum krevja at starvsfólk skulu reagera ella gera okkurt ítøkiligt. Loysnin verður eitt slag av fráboðanarskipan til starvsfólkini at arbeiða eftir, og stuðlar undir eftirlit sum ikki finst í dag. Henda standardskipan skal brúkast uppá tvørs í ymiskum samanhangum og skipanum. Er ávegis men ikki liðugt.

2.5	Standard skipan til skjalagoymslu	Gera eina standardskipan til skjalagoymslu. Tað kann t.d. vera skjøl ísmb. við útflutning og líknandi. TAKS hevur í dag fleiri ymiskar skipanir til slíkt, har skjøl skulu goymast ísmb. við ymiskar avgreiðslur. Henda standardskipan skal brúkast uppá tvørs í ymiskum samanhangum og skipanum. Er ávegis men ikki liðugt.
2.6	Virkisskattur	Nútíðargera skattarokningina og umsitingina av virkisskatti. Hetta snýr seg í stóran mun um at handfara upplýsingar sum TAKS hevur og fær ísmb. við skattagrundarlagnum hjá fyritøkum. Gamla skipanin er sera avmarkað hevur manglar. Projektið snýr seg tí eisini um at kanna hvørjir batar kunnu gerast. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomum eftirliti.
2.7	Virkisskattur, bókhald	Nútíðargera bókhaldið ísmb. við virksskatt, sektir, rentur og annað í hesum sambandi. Herundir skal bókingarhátturin endurskoðast, soleiðis at hann fylgir ávísum standardi ísmb. við levering av krøvum til bókhaldsskipanina.
2.8	Innflutningur	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av innflutningi til Føroyar. Her er talan um skráseting og útrokning av tolli og avgjøldum, bæði hjá borgarum og fyritøkum. Herundir skal bókingarhátturin endurskoðast, soleiðis at hann fylgir ávísum standardi ísmb. við levering av krøvum til bókhaldsskipanina. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomum eftirliti.
2.9	Flutningur	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av flutningi til og frá Føroyum. Hetta umfatar øll flutningsfør sum koma og fara úr føroyskum havnum og flogøllinum. Í hesum sambandi verða flutningsfeløg tikin við í arbeiðið við tí fyri eyga at betra um markamótnini og dataútvekslingina við TAKS. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomum eftirliti.
2.10	Famur	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av góðsi sum verður flutt til og frá Føroyum. Stóru flutningsfeløgini samskifta talgilt við TAKS. Projektið snýr seg tí eisini um at kanna og betra skipanina soleiðis at hon betri stuðlar undir skynsomum eftirliti. Talgildu markamótini ímillum flutningsfeløgini og TAKS skulu nútíðargerast. Flutningsfyritøkur verða tí partvíst tiknar við í arbeiðið.
2.11	Kapitalvinningsskattur	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av eftirliti ísmb. við útrokning av kapitalvinningsskatti bæði hjá borgarum og fyritøkum. Herundir skal bókingarhátturin endurskoðast, soleiðis at hann fylgir ávísum standardi ísmb. við levering av krøvum til bókhaldsskipanina. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomun eftirliti.

2.12	Vinningsbýti	Nútíðargera og effektivisera umsitingina og eftirlti ísmb. við útroknig av vinningsbýtisskatti bæði hjá borgarum og fyritøkum. Herundir skal bókingarhátturin endurskoðast, soleiðis at hann fylgir ávísum standardi ísmb. við levering av krøvum til bókhaldsskipanina. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomun eftirliti.
2.13	Avgjøld	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av avgjøldum, serliga MVG, men eisini umsitingina av øðrum avgjøldum. Herundir skal bókingarhátturin endurskoðast, soleiðis at hann fylgir ávísum standardi ísmb. við levering av krøvum til bókhaldsskipanina. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomun eftirliti.
2.14	Útflutningur	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av útfluttningi. Snýr seg um skrásetingina av útfluttum vørum. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomun eftirliti.
2.15	Toll- og vøruskrá	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av toll- og vøruskránni. Snýr seg um at effektivisera hópdagføringar eftir altjóða standardum. Eisini verður kannað hvussu hópdagføringar í skránni kunnu gerast manuelt.
	Menningarleið 3	
3.0	Ferðastuðil	Ger av nýggjari sjálvgreiðslu til borgarar at søkja um ferðastuðul. Herundir verður umsitingin av ferðastuðuli nútíðargjørd. Projektið er liðugt og avgreitt ultimo 2023, men onkrar smávegis betringar skulu gerast í 2024.
3.1	Barsilsgrunnurin	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av barsilsskipanini, og ger av sjálvgreiðlsu til bæði borgarar og fyritøkur. Nýggj skipan verður gjørd til starvsfólkini til umsiting av barsilsumsóknum og útgjøldum. Herundir skal bókingarhátturin endurskoðast, soleiðis at hann fylgir ávísum standardi ísmb. við levering av krøvum til bókhaldsskipanina. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomun eftirliti. Barsilsgrunnurin fíggjar hetta projektið.
3.2	Standardkladda, skipan	Gera eina standardskipan til at goyma fyribilsupplýsingar (kladda). Skipanin skal brúkast í sambandi við at brúkarin skal kunna inntøppa umfatandi mongdir av data, og at tað skal vera møguligt at goyma ólidnar upplýsiningar/inntøppingar fyribils. Henda standardskipan verður endurbrúkt uppá tvørs í øllum skipanum har tað gevur meining.
3.3	Standard integratión til 360	Gera eina brúkaravinarligan og standardiseraðan máta/skipan at flyta seg ímillum Kjarnuskipanir og jounalskipan uttan at skulu gera dupultarbeiði. Henda standardskipan verður endurbrúkt uppá tvørs í øllum skipanum har tað gevur meining.

3.4	Standard fyrispurningarskipan	Gera eina standardskipan har starvsfólk hava møguleika fyri at uppbyggja og goyma egnar fyrispurningar innan ávís øki í ymsikum skipanunum, sum eru viðkomandi fyri júst tey - teirra egna privata "arbeiðs-skriviborð".
3.5	Rentistuðil	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av umsóknum um rentistuðul. Projektið snýr seg um at endurskoða og betra processina. Harafturat er ætlanin eisini at skipanin skal kunnu stuðla undir skinsomum eftirliti.
3.6	Frítíðarløn	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av frítíðarløn. Skipanin er rímiliga effektiv longu nú, men projektið snýr seg í stóran mun um hvussu stuðlað verður undir eftilitinum við útgjaldinum.
3.7	Brukaraumsiting BG og VG	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av brúkarum í Vinnuglugganum, umframt umsitingar av fulltrúum í Borgaraglugganum. Harafturat skal eisini kannast hvussu betrast kann um eftirlti við brúkaraatgongd.
3.8	AM grunnurin	Nútíðargera og effektivisera umsitingina av AMEG. Snýr seg um betran av umsitingini av inngjøldum, undantøkum og útgjaldinum. Projektið skal fíggjast av AM grunninum. Hetta er ikki viðgjørt við AM grunnin.
	Menningarleið 4	
4.1	Debitorbókhald	Nútíðargera og effektivisera tær ymisku bókhaldsskipanirnar, soleiðis at tær verða samlaðar í eina skipan. Projektið snýr seg harumframt eisini um at kanna um tað er møguligt og meira gagnligt at fara yvir til eina standard debitorskpan heldur enn at nútíðargera núverandi bókhaldsskipan. Óansæð um talan verður um eina nýggja standard skipan ella nútíðargerð av verandi skipan, skal bókingarhátturin endurskoðast og standardiserast. Eisini skal kannast um tað er møguligt at hava standardiseraðar gjaldsfreistir og renturokningar. Hetta krevur helst lógarbroytingar og Gjaldstovan verður eisini partur av hesum.
4.2	Útgjald	Nútíðargera/effektivisera og standardisera útgjaldingar. TAKS brúkar útgjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni. Gjaldstovan verður tikin við í arbeiðið, og kannað verður um TAKS og Gjaldstovan í felag kunnu nútíðargera og betra um markamótini.
4.3	Gjaldstovubókhald	Endamálið við hesum er at endurskoða og nútíðargera loysnina/skipanina sum er gjørd ímillum TAKS og BSL. Endamálið er at tryggja at landsroknskapurin í BSL verður dagførdur við upplýsingum við teimum nógvu ymisku krøvum og útgjaldssløgunum sum TAKS umsitur. Gjaldstovan verður tikin við í hetta arbeiðið at finna og gera bestu loysnina.

4.4	Innheinting	Nútíðargera og effektivisera umsitingina til at innheinta skuld hjá borgarum og fyritøkum. Loysnin hongur saman við hvørt TAKS velur at nútíðargera verandi bókhaldskipan, ella velur at keypa eina standard skipan. Projektið snýr seg eisini um nútíðargerð av afturhaldsskipanini og mótrokning, herundur dekningsraðfylgja av krøvum o.a. Projektið snýr seg eisini um hvussu sjálv málsvgiðerðin endaliga kann flytast í journalskipanina, sum TAKS annars brúkar til alla aðra málsviðgerð. Harafturat verður kannað hvussu skipanin kann stuðla undir skinsomun eftirliti við td. fyrning og øðrum.